# SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ

# ÁRSFRÁGREIÐING 2009

Nevndin setti sær fyri at arbeiða víðari við málunum, sum vóru ásett fyri árið 2008.

1. **Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum**
2. **Dagføring og viðtøka av viðtøkunum fyri sjúkrarøktaretiska ráðið.**
3. **At gera etiska ráðið meira sjónligt millum limirnar í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
4. **Fylgja við í kjakinum um trygdina av persónsupplýsingum í samband við innføring av Talgildu Heilsuskipanini í Heilsuverkinum**

**Ad. 1 Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum.**
Á regluligu fundunum hava limirnir greinað og viðgjørt etiskar tvístøður, sum limirnir sjálvir hava upplivað ella lisið í fakligum tíðarritum. Hetta hevur verið gjørt fyri at menna kompetensuna hjá limunum at viðgera tvístøður.Vit hava sett okkum spurningin, hvussu tað man bera til, at so gott sum eingin etisk tvístøða verður send ráðnum til viðgerðar. Vit taka tað ikki sum eina mynd av, at sjúkrarøktarfrøðingar ikki diskutera hesi evni í dagliga yrkinum, men heldur sum, at tað tykist fremmant at senda spurningar til onnur at viðgera.

Fleiri fakfeløg í norðurlondum hava sjúkrarøktarfaklig etisk ráð. Hesi hava nú í 4 ár fyrireikað og hildið ráðstevnur um sjúkrarøktaretikk, skift ímillum tey ymisku londini. Í ár var ráðstevnan hildin í Stokkholmi við trimum høvuðsspurningum til viðgerðar. Eutanasi, frymlar til etiska greining og hvønn rætt hava friðskjólssøkjandi, pappírsleys og fjald menniskju til heilsu- og sjúkuviðgerð. Ráðstevnan var skipað við uppleggi, fyrilestri og fyri ein stóran part við orðaskifti í arbeiðsbólkum og felags samanumtøku.

Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur eisini valt at brúka ein lítlan part av játtanini til at keypa bøkur, sum viðgera etiskar spurningar. Hesar bøkur skulu eisini vera tøkar hjá limum felagsins at lána.

**Ad. 2 Dagføring og viðtøka av viðtøkunum fyri sjúkrarøktaretiska ráðið**
Fyrst í árinum var arbeiðið við at dagføra etisku viðtøkurnar úr hondum greitt. Tær vóru lagdar fyri aðalfundin til støðutakan. Stutt kunning var givin á aðalfundinum frammanundan atkvøðugreiðsluni. Limirnir settu nakrar spurningar fram, sum tó ikki førdu til broyting í orðingunum. Viðtøkurnar vóru viðtiknar við ongum mótmæli.

## SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ

## ÁRSFRÁGREIÐING 2009

**3. Gera sjúkrarøktaretiska ráðið meira sjónligt millum limirnar**

Limirnir í Sjúkrarøktaretiska ráðnum meta framvegis, eins og árini frammanundan, at ráðið verður ov lítið brúkt, bæði av nevndini í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og av limunum yvirhøvur. T.d. hevur etiska ráðið heldur ikki seinasta árið fingið uppskot til lógir og reglugerðir til hoyringar.

Ráðið kann tó eisini taka mál til viðgerðar av sínum eintingum.

Sum ein partur av at sjónliggera sjúkrarøktaretiska ráðið, eru samtyktir frá norðurlendsku ráðstevnuni um etikk skrivaðar og lagdar á heimasíðu felagsins. Ætlanin er eisini at leggja samandrátt av frágreiðingini frá etisku ráðstevnuni á heimasíðu felagsins.

**4. Fylgja við í kjakinum um trygdina av persónsupplýsingum í samband við innføring av THS (Talgildu Heilsuskipanini í heilsuverkinum)**

Ífylgi sjúkrarøktarfrøðingi Mariu Hammer Olsen úr THS-toyminum eru ongar broytingar hendar seinasta árið á hesum økinum. Fyri stuttum hevur Dátueftirlitið verið á kanningarferð, uttan at stórvegis viðmerkingar vóru gjørdar. Reglugerð um mannagongdir viðvíkjandi dátutrygd í samband við THS fyriliggur. Í samband við undirvísing á deildunum viðvíkjandi THS verður kraftiga undirstrikað, at lóg um sjúklingarættindi skal yvirhaldast neyvt.

Sjúkrahúsini eru deild upp í journaleindir. Hvørt sjúkrahús verður at rokna sum ein eind. Hetta merkir, at starvsfólk kunnu leita fram upplýsingar úr journalini hjá sjúklingum á aðari deild. Men **bert, tá** lóg um sjúklingarættindi gevur heimild til tess.

Sjúkrahúsini sínamillum og millum sjúkrahúsini og kommunulæknaskipanina eru skott, sum bert læknar hava rætt at fara yvir um, og tá skal orsøkin vera sambærilig við lóg um sjúklingarættindi.

**Framtíðarætlan**

Etiska ráðið var stovnað á aðalfundinum hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar 1992 og er sostatt 20 ár 2012. Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur tikið tað til umrøðu, fyri at vera í góðari tíð til at viðgera, hvat skal gerast fyri at markera hetta. Fleiri uppskot eru frammi og ráðið skal arbeiða víðari við hesum evni í 2010.

# SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ

# ÁRSFRÁGREIÐING 2009

**Nevndarlimir til Sjúkrarøktaretiska ráðið**

Valskeiðið hjá limunum sær nú soleiðis út. Sigrun Wardum endurvald 2007 til 2011. Súsanna Olsen og Maiken Olsen 2007 til 2011. Hildur við Høgadalsá 2006 til 2010, Sirið Stenberg 2009 til 2013.